

## 27 milliónir bilar á lagri

Tað er ikki stuttligt at vera bilforhandlari í hesum døgum. Stjórin fyri Ford Deutschland, Bernhard Mattes, sigur við týska dagblaðið, Handelsblatt, at tað í løtuni standa ikki færri enn 27 milliónir bilar runt um í heiminum hjá bilforhandlarum og bíða eftir einum keypara. – Eitt astronomiskt tal og eitt týðiligt tekin um kreppuna, skrivar blaðið. Mattes sigur, at Ford í Týsklandi eisini kann enda í einari støðu, har starvsfólkið kann verða noytt at fara niður í arbeiðstíð, orsakað av lítla eftirspurninginum. Bæði VW og BMW hava boða frá niðursettari arbeiðstíð í ávísum tíðarskeiðum í vetrarmánaðunum, skrivar tíðindastovan Direkt, sambært boersen.dk.

# pp aftur



Noregi, kommandørunum Carl og Gudrun Lydholm. Standandi sosialstjóri, Elisabeth

Mynd: Ranveig Bøe



*Haraldur kongur heilsar upp á Per Gynt í filminum Gatas Gynt*

Mynd: Ranveig Bøe



*Hjúnini Erla og Njál Djurhuus fáa heiðurstekin fyri trúgva og framúrskarandi tænastu*

eitt gott samstarv við allar sosialar stovnar hjá Frelsunarherinum og hjá øðrum, og við hini sjúkrahúsini í Oslo eins og kommunulæknaskipanina.

### Áhugaður kongur

Tað er eitt stórt arbeiði, sum verður gjørt fyri tey heimleysu og rústengdu á gøtuni í Oslo, og tað er heldur ikki nakað, ið fer óansað aftur við borðinum.

Sjálvur Haraldur kongur av Noregi hevur stóran áhuga í arbeiðinum.

- Tað krevur ein sterkan rygg at fara gjøgnum skemd og háðan við virðing, segði Haraldur kongur í sínari nýggjársrøðu, og helt fram: - ...høvdu vit viðurkent, at øll menniskju er líka nógv verd, høvdu vit ikki góðtikið, at nøkur verða møtt við niðurlátan og háðan orsakað av, at tey stríðast við rústrupulleikar.

Og tað er ikki bara í talu, at kongurin vísir áhuga. Hann var eisini við til frumsýningina av filminum »Gatas Gynt«, ið er ein dramatisering av 5. parti av leikinum »Per Gynt« eftir Henrik Ibsen, har tað eru rúsmisnýtarar av gøtuni, sum hava leiklutirnar.

Tað kom tí ikki óvart á, at kongurin eisini var við, tá gøtusjúkrahúsið læt upp aftur eftir útbyggingina.

Tað hevur nógv at siga fyri sjúklingarnar á gøtusjúkrahúsinum, at kongur er til staðar, og tað er við til at uppfylla kongsins ynski í nýggjárstaluni um, at vendingin »samfelagsins veikastu« missir meiningina.